sosialurin
Internet: http://www.cybernet.dk/faroe-news

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Kristjan Dahl
Lýsingar og søla: Marjun Dalsgaard

Blaðstjórnarfulltrúi: Randi Jacobsen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Eiríkur Lindenskov, Dagny Joensen, Grækaris D. Magnussen, Eyðun Klakkstein
Ljósmyndari: Jens Kristian Vang

Útgevari, uppseting og prent: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argjum
Postadr.: Postsmoga 76, 110 Tórshavn

Telefon: 11820
Telefax: 14720
e-mail: sosialur@olivant.fo

Vælkomin Davið og Ástríður

Oddagrein

FLOVANDI er tað at hoyra stjórnarleiðara í næsta grannalandi okkara kenna seg heima í Føroyum. Vit kunnu eisini siga honum, at tað eru mangir føroyingar, sum kenna seg heima í Íslandi, og eingin ivi er um, at hesar báðar tjóðirnar veruliga hava so nógv felags, at tað átti at verið gróðrarbotnur fyri einum óktum samarbeiði á so gott sum øllum økjum. Øll kenna vit tað á egnum kroppi, hvussu ómetaliga gott tað kann vera at hava góðar grannar. Og so er eisini, tá talan er um lond. Vit kenna Ísland sum ein góðan granna, og vit halda – eins og bæði Davíð Oddsson og Edmund Joensen - at hóast londini hava havt tætt samstarv í mong mong ár, so eru langt frá allir møguleikar troyttir. Fyri framman liggja stórir ótroyttir møguleikar, og tað eru slíkar, sum vit skulu fáa eygað á undir eini vitjan sum hesi. Tí er bæði rætt og gott, at stjórnarleiðarar í grannalondum okkara verða bodnir heim til okkara at vitja.

TIT bæði Davíð og Ástríður - kennið tykkum heima í Føroyum og farið aftur til Ísland við hesum boðskapi: at íslendingar skulu altíð kenna seg væl í Føroyum.

EITT eru føgur og góð orð. Annað er, hvat verður víst og gjørt í verki. Eisini her halda vit, at føroyingar og íslendingar í verki eru góðir grannar, men kanska vit hava verið í so varnir og ansnir at møtast andlit til andlit. Tað er líkasum, at meginlandið og har sjálvandi Danmark hevur størri atdráttarmegi á okkum.

EINGIN ivi er í okkara verð um, at vit við okkara tilknýti til Danmark og við Bretlandi sum granna kunnu vera ein brúgv millum Ísland og meginlandið. Hinvegin kunnu íslendingar vera ein trygd fyri, at vit ikki heilt missa okkum burtur orsakað av ávirkanini frá hesum londum.

NÓGV hevur verið tosað um Útnorðursamstarv og nú Atlantssamstarv. Tað er sum um at hetta samstarvið er í so ósjónligt. Her er hópin av møguleikum, og tað er greitt, at hugsa vit um hesi londini í Norðuratlantshavi sum eina ella aðra felags eind mótvegis Europa og restini av heiminum, sum eru vit ómetaliga rík og væl fyri. Ikki fleiri enn 300.000 fólk hava rættin til eitt av heimsins ríkastu økjum. Her hugsa vit fyrst og fremst um livandi tilfeingið í havinum, men hvat nú um ráevni eru í undirgrundini! Hvussu ríkt verður so ikki Útnorðurøkið!

Í øllum hesum tosinum um tilfeingi og ríkidømi er so ómetaliga týdningarmikiðikki at gloyma men verja og hjúlka um mentanina, og er eingin ivi um, at vit her hava nógv nógv at læra av íslendingum. Ikki tí, áhuga og skapanartrongd bagir ikki her heima. Tað er meira spurningurin um hjá tí almenna at virða mentanina so mikið, at pengar verða settir av til hana eins væl og til handilsstevnur ol. Tí skal okkara ynski til løgmann eftir vitjanina hjá íslendsku forætisráðharrahjúnum vera: at vit føroyingar læra av íslendingum við eitt nú frá almennari síðu at stuðla mentan og list í størri mun enn vit gera í dag.

Sosialurin

Olja og havumhvørvi

Nýliga hevur grein staðið í bløðunum, har harmast verður um, at Føroyar ikki enn hava tikið við tí sonevndu OSPAR-konventiónini um havumhvørvið. Í greinunum verður Oljuráðleggingarnevndin, ið undirritaði er formaður í, løgd undir at vera atvoldin til hetta, við tí í kvittanum at landsstýrið skal kunna bjóða oljufeløgum at virka á føroyskum havøki undir linari umhvørvistreytum enn í okkara grannalondum.

Tað er ikki hvørt gildi ein skal fara til og hvørt orð ein skal svara til. So hóast hesa rættiliga álvarsomu skuldseting hevði eg ætlað mær at láta greinina farið aftur við borðinum.

Men eg eri vorðin varur við, at greinir, ið nerta við oljuspurningar, ofta verða týddar til onnur tungumál og lisnar við áhuga í altjóða oljufeløgunum. Tí er vandi fyri, at hesar illgitingar, verða tær standandi ósvaraðar, kundu verið tiknar fyri fult, ikki minst av lesarum, ið vita, at greinskrivarin er ongin minni enn ein týðandi føroyskur umhvørvistyrisitari, nevniliga leiðarin av umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Jákup Pauli Joensen. Hann er eisini formaður í tí nevnd, sum landsstýrismaðurin í umhvørvismálum - m.a. eftir áheitan frá undirritaða - setti fyri knøppum ári síðan at dagføra ta løggávu, ið er galdandi fyri føroyska havumhvørvið.

Eg eri ikki serfrøðingur í havumhvørvismálum. Men Arne Nørrevang, professari, ið situr sum havumhvørviskønur limur í oljuráðleggingarnevndini hevur altíð í nevndini verið heitur forsprákari fyri at fáa Føroyar við í OSPAR sáttmálan, m.a. fyri at fáa atgongd til tær sakkønu nevndir, ið setast skulu undir hesum sáttmála. So hevði Jákup Pauli lagt í, kundi hann frá oljuráðleggingarnevndini havt fingið heitastu viðmæli um at fáa Føroyar undir OSPAR-sáttmálan.

Eg havi skilt, at OSPAR-sáttmálin er undirritaður í 1992 og skal avloysa tveir aðrar sáttmálar um líknandi evni, nevndir ávikavist Oslo- og Paris-sáttmálin. OSPAR sáttmálin kemur í gildi, tá ið nóg nógv lond hava góðtikið (ratifiserað) hann. Hetta væntast at henda í summar. Danmark hevur góðkent hann, men við fyrivarni fyri Føroyar. Í Føroyum skal hann góðkennast av løgtinginum, men samstundis skal tryggjast, at havumhvørvisløggávan í Føroyum uppfyllir tey krøv, ið londini, ið ganga undir sáttmálan, átaka sær.

Málsøkið »havumhvørvi« er ikki yvirtikið sum sermál. Havumhvørvisløggávan á føroyskum havøki er donsk løggáva, sett í kraft í Føroyum við kongligari fyriskipan, við teimum broytingum, ið tey serligu føroysku viðurskiftini verða hildin at krevja.

Tann nevndin, ið greinskrivarin Jákup Pauli Joensen, er formaður í, arbeiðir við eini nýggjari kongligari fyriskipan, ið dagførir føroyskar havumhvørvisreglur, m.a. so at tær kunnu gera Føroyar førar fyri at luka krøvini í OSPAR sáttmálanum. Eisini skal nevndararbeiðið avklára, um tað framhaldandi skulu vera danskir umhvørvismyndugleikar, ið umsita havumhvørvisáriníð frá møguligum oljuvirksemi, ella um tað skulu vera føroyskir myndugleikar. Hetta kundi verið náttúrligt, eftir at málsøkið »ráevni í undirgrundini« er yvirtikið sum sermál. Av hesi orsøk eru bæði oljuráðleggingarnevndin og oljufyrisitingin umboðað í nevndini. Greinskrivarin hevur sostatt havt stuttan veg, um hann helt tað vera vert at kunna seg um, hvat landsins oljumyndugleikar halda um sambandið millum olju- og umhvørvispolitikk, áðrenn hann fór í bløðini við tí.

Tað tykist mær hugstoytt, at hugsanin um at slaka í umhvørviskrøvum yvir fyri eini møguligari oljuvinnu, yvirhøvur verður havd á lofti. Hetta kann hent tæna til at skapa iva um tað, ið eg eins og bæði oljuráðleggingarnevnd og oljufyrisiting higartil havi hildið verið sjálvsagt, nevniliga at føroyska havumhvørvið er ikki til sølu, og at tað sjálvsagt eru tey fremmandu oljufeløgini, ið skulu laga seg eftir føroyskum havumhvørvisreglum og ikki øvugt.

Við tí kunnleika, ið oljuráðleggingarnevnd og oljufyrisiting hava fingið til tey oljufeløg, ið higartil hava víst áhuga fyri at arbeiða undir Føroyum, haldi eg, at hesi feløg høvdu verið sera bilsin, um tey, sum Jákup Pauli tekur framundir, høvdu fingið eitt »tilboð« um at dálka tað føroyska havumhvørvið meir enn havumhvørvið í samanberiligum havøkjum í grannalondum okkara. Tey høvdu helst svarað, at tey fingu ikki tikið av, vegna tey strongu umhvørviskrøv, ið tey sjálvi hava sett sær innanhýsis. Serliga hevði »tilboðið« komið dátt við hjá teimum oljufeløgum, ið longu sjálvboðin hava brúkt pening upp á fyrireikandi havumhvørviskanningar við Føroyar, m.a. fyri at fáa kanningar, ið tey vænta, at myndugleikarnir kortini fara at krevja av teimum, so tíðliga í gongd, at tær ikki fara at darva einum komandi leitingarvirksemi.

Eg vóni at eg við hesum reglum havi gjørt tað, ið eg kann fyri at bøta nakað aftur av tí skaða uteftir, ið grein Jákup Paula kann hava verið atvold til. At embætismaður við ábyrgd skrivar greinir um málsøki, hann vegna stovn sín og Føroya landsstýri umsitur, har hann kemur við ógrundaðum skuldsetingum og illgitingum móti øðrum stovnum, man neyvan vera til gagns innanhýsis í Føroyum heldur, men tað er eitt annað mál, ið eg ikki leggi í at viðgera her.

At enda fari eg at ynskja Jákup Paula og nevnd hansara góða eydnu við arbeiði teirra við at dagføra havumhvørvisreglurnar á Føroya økinum. Somuleiðis, at landsstýri og løgting fara at taka væl ímóti øllum skilagóðum uppskotum frá nevndini, m.a. við tí úrsliti, at føroyingar óskammaðir kunnu fara inn í OSPAR samvinnuna áðrenn langt umlíður. Hóast tað ikki eru altjóða sáttmálar, sum t.d. OSPAR sáttmálin, men tær innlendsku umhvørvisreglurnar, ið gera av, hvussu væl havumhvørvið verður vart, kann luttøka í OSPAR-sáttmálanum helst hava eitt ávíst »signalvirði« bæði inn- og úteftir. Afturat hesum kemur, sum nevnt omanfyri, atgongdin hjá føroyskum serfrøðingum til tær arbeiðsnevndir, ið settar verða undir sáttmálanum. Ikki minst í sambandi við eina møguliga oljuvinnu, ræður um, at føroyskir myndugleikar nýta slík høvi til at kunna seg um ta tøkniligu menningina og tær avbjóðingar hon setir havumhvørvinum.

Í Keypmannahavn tann 17. mars 1997

Árni Olafsson